# Skattalætti og einskiljing á breddan

**Hóast bæði skattalættin og einskiljing eru viðkvom evni hjá Javnaðarflokkinum, ætlar formaður Javnaðarfloksins, Jóannes Eidesgaard, at umrøða bæði økini í síni formansfrágreiðing á landsstevnu Javnaðarfloksins um vikuskiftið.**

LANDSSTEVNA JAVNAÐARFLOKSINS
Páll Holm Johannesen
pall@sosialurin.fo

Fyri fyrstu ferð síðan 1994 kann Javnaðarflokkurin um vikuskiftið halda landsstevnu sum stjórnarflokkur. Eftir eina oyðimarkargongd í andstøðu í góð sjey ár, eydnaðist Javnaðarflokkinum aftur at koma í samgongu eftir løgtingsvalið 20. januar.

Støðan sum stjórnarflokkur fer sambært formanni floksins, Jóannes Eidesgaard, at seta sín dám á landsstevnuna um vikuskiftið.

### Breiða mynd

Jóannes Eidesgaard greiðir frá, at hann í formansrøðu síni ætlar geva eina breiða mynd av støðuni í føroyska samfelagnum í løtuni. Løgmaður sigur, at hann ætlar at tríva í fleiri tættir úr løgmansrøðuni á ólavsøku í ár. Millum málini, sum løgmaður ætlar at umrøða í formansfrágreiðingini, verða einskiljing, ES og sjálvsstýrismálið

– Einskiljing hevur leingi verið eitt heitt epli hjá Javnaðarflokkinum, og ætlanin hjá mær er at siga mína hugsan um spurningin.

Spurdur, um nógv umrøddi skattalættin hjá ABC-samgongan verður partur av kjakinum á landsstevnuni hjá Javnaðarflokkinum, svarar Jóannes Eidesgaard, at hann eisini hevur ætlanir at umrøða tann spurningin

– Eg ætli mær at royna at snara spurningin um skattalættan á. Vit hava dugað ov illa at gjørt vart við, at við skattalættanum kemur eisini ein umskipan av pensjónini, sum í nógv ár hevur verið eitt hjartamál hjá Javnaðarflokkinum. Politiski prísurin fyri at fáa umskipað pensjónsøkið er skattalættin, og tað mugu vit taka við, greiðir Jóannes Eidesgaard frá.

### Áheitan

Kommunuval stendur fyri durum, og formaðurin í Javnaðarflokkinum ætlar at koma við eini áheitan á landsfundinum til allar veljararnar um at standa saman um flokkin.

– Vit mugu royna á kommunuvalinum at gera okkum dælt av støðuni sum stjórnarflokkur, og vit eiga leggja nógv fyri, so Javnaðarflokkurin megnar at vinna nakrar týðandi borgarstjórasessir og fáa meirilutan í kommununum kring landið. Eg havi leingi fýlst á, at vit ikki standa okkum sterkari í eitt nú Havn, tí sammeta vit okkum vi Javnaðarflokkarnar í hinum Norðanlondum, eru Javnaðarflokkarnir vanliga rættiliga sterkir í høvuðsstaðarkommununi, vísir Jóannes Eidesgaard á.

# Javnaðarfólk skulu viga løgmann

**Í morgin, leygardagin, skal landsstevnan hjá Javnaðarflokkinum kjósa nýggja starvsnevnd - og fyri fyrstu ferð í 10 ár er ein løgmaður formansuppskot**

LANDSSTEVNA
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Javnaðarflokkurin hevur landsstevnu hetta vikuskiftið, og tað er fyrstu ferð í meira enn 10 ár, at flokkurin hevur løgmann - og harvið er tað eisini fyrstu ferð hesi árini, at flokkurin kann kjósa sær løgmann til floksformann.

Síðani nýggja landsstýrið tók við í februarmánaði, er ein veljarakanning almannakunngjørd, har spurt hevur verið um undirtøkuna hjá løgmanni. Tað var hon, sum Gallup Føroyar gjørdi fyri útvarpið fyrr í mánaðinum.

Sambært teirri kanningini hevði Javnaðarflokkurin stóra framgongd, 2,8% og hevði hann verið landsins størsti flokkur. Ta støðuna hevur Javnaðarflokkurin havt so mangan, men tað er langt síðani seinast – hann hevur ikki verið størsti flokkur síðani løgtingsvalið í november í 1990.

Í veljarakanningini hjá Gallup og Útvarpinum fekk Jóannes Eidesgaard størstu undirtøkuna sum løgmaður, 34%. Hann fór harvið fram um Anfinn Kallsberg, sum í sínari tíð sum løgmaður altíð hevði størstu undirtøku sum løgmaður í øllum kanningum. Hann fekk í hesi kanningini 30%.

**Fakta:**
Kanning Gallup Føroyar fyri Útvarp Føroya:
*Hvør av fylgjandi metur tú, er best egnaður sum løgmaður í Føroyum?*

| | |
|---|---|
| Jóannes Eidesgaard: | 34% |
| Anfinn Kallsberg: | 30% |
| Høgni Hoydal: | 14% |
| Veit ikki: | 8% |
| Eingin av hesum: | 7% |
| Kaj Leo Johannesen | 5% |
| Kári P. Højgaard: | 1% |
| Jenis av Rana: | 1% |



# Nýggj láni-avtala fyri árslok

**Smyril Line fer í næstum í samráðingar um eina nýggja avtalu við útlendsku bankarnar, sum fíggja Norrönu. Smyril Line hevur biðið bankarnar um lægri avdráttir í trý ár, og miðjað verður eftir, at ein nýggj avtala kemur í gildi 1. desember 2004**

TÍÐINDASKRIV
*SMYRIL LINE*

– Oktober og november skulu brúkast til at fáa í lag nýggja avtalu við útlendsku bankarnar, sum fíggja Norrönu. Talan er um týsku bankarnar, Kreditanstalt für Wiederaufbau og HSH Nordbank, og hollendska bankan, ING Bank. Hesum boðar Smyril Line frá í tíðindaskrivi í dag.

Bankarnir eru til reiðar at samráðast um eina nýggja avtalu við Smyril Line, sum ætlandi skal koma í gildi 1. desember, men fyrst vilja teir hava fleiri upplýsingar og fíggjarætlanir fyri 2005-2007.

Smyril Line skal brúka oktober-mánað at útvega bankunum tilfarið, teir hava biðið um, og síðani verða samráðingar í november, sum skulu miðja eftir, at ein nýggj avtala kemur í gildi 1. desember 2004.

Smyril Line skal sambært galdandi avtalu rinda útlendsku bankunum tilsamans 60 milliónir krónur í rentum og avdráttum um árið í 14 ár. Smyril Line hevur skotið upp fyri bankunum, at bert rentan á 12 milliónir krónur verður goldin afturat í ár, og at avdráttirnir verða lægri í trý ár frá 2005 til 2007. Um bankarnir góðtaka uppskotið hjá Smyril Line, skal felagið rinda 30 milliónir krónur næsta ár og 38 milliónir krónur árliga í 2006 og 2007 í rentum og avdráttum.

Smyril Line rindaði útlendsku bankunum 30 milliónir krónur í vár og skuldi eftir avtaluni gjalda 30 milliónir krónur 7. oktober, men nú samráðst verður um nýggja avtalu, skal felagið onki gjalda, fyrr enn nýggja avtalan er undirskrivað og komin í gildi 1. desember.

Smyril Line hevði 35 milliónir krónur í halli í fjør, men fyribils metingar vísa, at tað nú gongur betur. Felagið seldi í vár gomlu Norrönu fyri 27 milliónir krónur, og farma- og ferðafólkaflutningurin hevur hilnast betur í ár enn í fjør.

## Kunning um íbúðir

**Húsameklarafelagið INNI hevur týsdagin opið hús, har fólk fáa kunning um ætlaðu byggingina av íbúðum á Boðaneshamri**

BYGGING
*Tíðindaskriv*

Týsdagin 28. september ber til at fáa alt at vita um ætlaðu bygginina av íbúðum á Boðaneshamri í Havn. Tá bjóðar húsameklarafelagið INNI til opið hús í høvuðssætinum hjá Føroya Sparikassa í Havn.

Tiltakið er kunnandi, og t.d. fara umboð fyri arkitektarnar og byggiharran aftan fyri byggiætlanina at greiða frá um íbúðirnar á Boðaneshamri. Eisini seljarin verður til staðar og greiðir frá sínum leikluti.

ONV Arkitekter hava teknað teir nýggju og serliga snøggu íbúðabygningarnar við tí góða útsýninum. MT Højgaard er byggiharri, og P/F INNI er seljari.

Ráðgevarar frá Føroya Sparikassa verða eisini við í opna húsinum, og tí ber eisini til at fáa hópin at vita um møguleikarnar at fáa fígging.

Tiltakið byrjar Yviri við Strond 2 seinnapartin týsdagin 28. september kl. 17.00. Tá verður byggiætlanin løgd fram, og framløgan verður endurtikin kl. 19.00. Allar tímarnar frá kl. 17.00 til 22.00 er møguleiki at hitta og skifta orð við luttakararnar, og møguligir keyparar og onnur áhuga eru vælkomin við spurningum og ynskjum í sambandi við verkætlanina.

Við í framløguni týsdagin eru m.a.:

- Model av íbúðabygningunum
- Projekttekningar við nøkrum av innkomnu broytingaruppskotunum
- Lýsingar og royndir av tilfari
- Myndir av bygningunum innan
- Myndir av líknandi bygningum í Danmark

Øll áhugað eru hjartaliga vælkomin til opið hús, har Húsameklarafelagið INNI eisini bjóðar okkurt gott undir tonnina.



# Viðgerast mann til mann



**Formaður Tjóðveldisfloksins, Høgni Hoydal, sigur seg ikki hava sagt ósatt í málinum um skrásett parlag. Ósemjan millum seg og Tórbjørn Jacobsen verður viðgjørd innahýsis og ikki í fjølmiðlunum, sigur Høgni Hoydal**

ÓSEMJA Í TJÓÐVELDISFLOKKINUM
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

„Vónandi er hann skeivt endurgivin. Um ikki, so er hetta heimsmetið í manipulatión og tann størsta lygnin, sum higartil dags er serverað føroyingum".

Tað var ikki hissini, sum løgtingslimurin hjá Tjóðveldisflokkinum, Tórbjørn Jacobsen, legði floksformannin, Høgna Hoydal, undir í lesarabrævi í Sosialinum hósdagin.

Formaður Tjóðveldisfloksins, Høgni Hoydal, ynskir ikki at gera stórvegis viðmerkingar til persónliga álopið frá eysturoyartingmanninum, Tórbirni Jacobsen.

– Øll í flokkinum hava sjálvsagt rætt til at hava sína erligu meining um mín persón og málið, men tá, tú verður ákærdur fyri at siga ósatt, verður talan um ein øðrvísi trupulleika, sigur hann

Høgni Hoydal leggur dent á, at persónligu viðurskiftini millum seg og Tórbjørn verða viðgjørd innanhýsis og ikki í fjølmiðlunum, og tí hevur hann onga viðmerking til málið.

– Hetta verður viðgjørt mann til mann, sigur hann

Formaðurin í Tjóðveldisflokkinum vil, hvørki siga nær flokkurin fer at viðgera støðuna ella um lesarabrævið fer at fáa avleiðingar fyri Tórbjørn Jacobsen í flokkinum.

Spurdur, um útsøgnin hevur skatt umdømið hjá flokkinum, svarar Høgni Hoydal, at tað mugu fólk sjálvi gera sær eina meting um.

### Sigur satt

Høgni Hoydal tvíheldur um, at hann ikki hevur sagt ósatt í málinum um skrásetta parlagið. Hann mælir fjølmiðlunum til at eftirkanna málið.

– Talan var um eina yvirtøku, og ikki eina dagføring av eini danskari lóg, og parturin við skrásetta parlagnum var við í pakkanum. Samráðingarnar við danir vóru eisini lidnar, og frágreiðingin til aðalorðaskiftið var eisini á trappuni, sigur Høgni Hoydal.

Formaðurin vísir tí aftur útsøgnini hjá Tórbjørn Jacobsen um, at hann ætlaði at dagføra donsku lóggávuna, sum frammanundan var galdandi á økinum.

# Fáorðað aðalstjórn

Jóannes Dalsgarð er aðalstjórnarformaður í Tjóðveldisflokkinum, og hann vil ikki gera nakra viðmerking til persónliga álopið hjá Tórbjørn Jacobsen á floksformannin Høgna Hoydal.

– Málið er somikið nýtt, at eg verið noyddur at seta meg inn í málið, áðrenn eg kann gera nakra viðmerking til málið, sigur Jóannes Dalsgarð.

*-páll*

# Hoydal koyrir solo

**Tórbjørn Jacobsen kendi seg noyddan at tríva í pennin fyri at steðga floksformanninum, Høgni Hoydal, sum áhaldandi fer í sjálvdrátti út til fjølmiðlarnar at siga sína persónliga hugsan um skrásett parlag uttan, at hann tekur atlit til sjónarmiðini í flokkinum**

ÓSEMJA Í TJÓÐVELDISFLOKKINUM
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

–Høgni Hoydal koyrir áhaldandi solo í málinum um skrásetta parlagið, hóast stór ósemja er um málið í flokkinum. Flokkurin hevur fleiri ferðir átalað framferðarháttin hjá honum, men tað rínur ikki við. Tá hann ikki vil lurta eftir, var eg noyddur at siga mína hugsan á annan hátt, og tí varð lesarabrævið skrivað.

Løgtingsmaðurin hjá Tjóðveldisflokkinum av Glyvrum, Tórbjørn Jacobsen, hevur gjørt tað enn einaferð. Uttan mun, um tað er løgmaður ella floksformaður, ið standa honum í vegin, fýrir buldrutti tingmaðurin ikki fyri at siga sína persónligu hugsan alment.

Seinasta dømið er málið um skrásett parlag.

Í hvassorðaðum lesarabrævi leggur hann floksformannin Høgna Hoydal undir at seta heimsmet í manipulatión og føra fram størstu lygnina, sum higartil er serverað føroyingum í málinum um skrásett parlag, sum hann málber seg.

Orsøkin til, at Tórbjørn setti seg við telduna, og legði formannin undir at siga ósatt er hon, at Høgni Hoydal áhaldandi fer í sjálvdrátti út til fjølmiðlarnar at siga sína persónliga hugsan um málið uttan, at hann tekur atlit til sjónarmiðini í flokkinum.

–Hvørja ferð hann úttalar seg alment, dettur hansara persónliga meining hjá honum aftur á flokkin, og tað er ikki rætt, tá fleiri flokslimir eru rúkandi ósamdir við hansara sjónarmiðum, sigur Tórbjørn Jacobsen

### Ongar avleiðingar

Spurdur, um hann hevur fingið ákoyringar frá floksfeløgum fyri at alment leggja eftir formanninum, svarar Tórbjørn, at hann hevur einki hoyrt enn.

– Eg havi ikki gjørt annað enn at siga mína meining, og eg eri líkaglaður við, hvat hini í flokkinum halda, sigur hann

*Hví hevur tú ikki neyðugu floksdisciplina, og heldur ósemjuna innanfloks ?*

Í hesum førum er tað ikki eg, sum ikki haldi floksdisciplina. Hóast vit hava tosað saman fleiri ferðir, koyrir Høgni kortini solo. Tað er floksdisciplinin hjá Høgna sum haltar, sigur Tórbjørn Jacobsen.

### Avgerðin tikin

Í Degi og viku hóskvøldið kom undan kavi, at Tórbjørn Jacobsen bæði hevur tikið seg aftur sum næstformaður í starvsnevndini og í tingbólkinum. Eysturoyartingmaðurin leggur dent á, at avgerðin at taka seg aftur sum næstformaður varð tikin áðrenn lesarabrævið varð skrivað, og hevur einki við málið um skrásett parlag at gera.

Tórbjørn Jacobsen vil ikki greiða nærmari frá, hví hann hevur tikið seg aftur, men sigur í stuttari viðmerking, at avgerðin er tikin av persónligum áðum.